# Ársfrágreiðing 2006

## Frágreiðing um virksemi stovnsins og gongdina á fjarskiftismarknaðinum

**Fjarskiftiseftirlitið**
Tórshavn 15. mars 2007

## Fororð

Eftir at nýggi bygnaðurin hjá (P/F Telefonverkinum) Føroya Tele varð settur í verk 1. juli 2005, og meginparturin av tænastuvirkseminum varð lagt í P/F FT Samskifti og kervisvirksemið í P/F FT Net, hevur fjarskiftimarknaðurin í 2006 kanska serliga verið merktur av avleiðingunum av hesum nýggja bygnaði, umframt at einskiljingartilgongdin av Føroya Tele hevur verið nógv til umrøðu.

Í 2006 sáð eisini nýggj breiðbandsfyritøka dagsins ljós. EITT byrjaði sítt virksemi í juni 2006 og eigarar av fyritøkuni eru Elektron og KALL.

Vøksturin av breiðbandshaldum hevur, eins og undanfarin ár, verið stórur í 2006. Flest øll húsarhald í Føroyum hava nú møguleika at keypa breiðsbandstænastur. Tað eru heilt fá búpláss eftir, ið ikki hava møguleika at samskifta umvegis breiðbandið; í samband við byrjan at veita breiðbands tænastur er tað fyri veitaran í høvuðsheitum ein spuringur um stovnsetingarkostnað í mun til íbúgvaratal og inntøkumetingar.

Breiðbandsbreiðslan við árslok 2006 var umleið 20,4 roknað við 48.500 íbúgvum. Um hædd verður tikin fyri at meðaltalið av fólki pr. húskið er týðandi hægri enn í eitt nú Íslandi, so kann staðfestast at Føroyar ikki liggja nógv aftanfyri støðið fyri, sum okkara nærmastu grannalond liggja á og sum eru av fremst londum í heiminum innan breiðsbandsútbreiðslu. Flatrate breiðbandshald, har tú kanst nýta internetið so nógv tú vil fyri fastan kostnað, hevur rættuliga tikið dik á seg í farna árið.

IP-telefoni kom á føroyska marknaðin í desember 2005, men hevur tó ikki rættuliga tikið dik á seg í undanfarna árið. Við árslok 2006 vóru 450 IP-telefoni hald, mótvegis 309 við endan av 1. hálvári 2006. Í 2007 kann tó væntast at IP-telefoni útbreiðslan fer at økjast, m.a. av tí at útboði av IP-telefoni fer at økjast. At ringa til útlandið er munandi bíligari um tú nýtir IP-telefoni, enn vanliga fastnet telefoni ella fartelefon.

Nýtslan av fartelefon økist framvegis og fartelefonin hevur fingið umráðandi leiklut í samfelagnum innan ymisk økir; eitt nú til kunning av ymiskum slag.

Mest spennandi spuringurin á føroyska fjarskiftisøkinum í liggur fyri framman, er hvussu einskiljingin av Føroya Tele fer at fara fram. Her ræður um at finna eina loysn sum ikki læsur støðuna fasta framyvir, men gevur møguleika fyri tillaginum, soleiðis at føroyski fjarskiftismarknaðurin til eina og hvørja tíð hevur kappingarførar og dagførdar kervistænastur, sum allir veitarir hava javnbjóðis atgongd til og harvið hava møguleika at veita endabrúkarinum eitt breitt og fjølbroytt útboð av fjarskiftistænastum til kappingarførar prísir.

*Jógvan Thomsen*
*stjóri*

**Fjarskiftiseftirlitið**
Fjarskiftiseftirlitið (í hesi frágreiðing eisini nevnt **FSE**) er stovnur undir Vinnumálaráðnum, ið umsitur Ll. nr. 79 frá 23. mai 1997 um fjarskifti, við seinni broyting í Ll. nr. 176 frá 21. desember 2001 (fjarskiftislógin).

<u>Endamálið við fjarskiftislógini er m.a.:</u>

a. at fjarskiftistørvurin verður nøktaður,
b. at fremja skilagóða nýtslu av tilfonginum, og
c. at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum.

Í reglugerð fyri Fjarskiftiseftirlitið er nærri ásett, at eftirlitið m.a. skal virka fyri:

"- at fremja kapping innan fjarskifti, við tí fyri eyga at geva brúkararunum, vinnulívi v.m. atgongd til eitt fjøltáttað og breitt útboð av fjarskiftisveitingum til lágar prísir og við høgari góðsku, sambært endamálið lógarinnar -"

**Stovnurin Fjarskiftiseftirlitið**
Fjarskiftiseftirlitið er skipaður sum stovnur saman við:

1. Kappingarráðnum (skrivstovuni) www.kapping.fo
2. Posteftirlitinum www.posteftirlit.gov.fo
3. Tryggingareftirlitinum, ið eisini fevnir um eftirlit við Føroya Realkredittstovni (Realinum) www.tryggingareftirlit.gov.fo
4. Skráseting Føroya www.skraseting.gov.fo

Stjórin á Fjarskiftiseftirlitinum er eisini stjóri fyri hesar fýra stovnarnar/skrivstovurnar. Harumframt verða starvsfólk á hesum stovnunum í ávísan mun brúkt tvørgangandi innan ymisku økini.

Á stovninum eru fylgjandi starvsfólk:

| Starvsheitir | Útbúgving |
|---|---|
| 1. Stjóri | M.Sc. E.E, B.Com. |
| 2. Samskipari á radioøkinum | Verkfrøðingur |
| 3. Fulltrúi | Løgfrøðingur |
| 4. Eftirlitsmaður á radioøkinum | Vaktofficer og fjarritari |
| 5. Bókhaldari og skrivstovumaður | Skrivstovuútbúgving |
| 6. Skrivari, journalførari v.m. | Korrespondentur |
| *Harumframt arbeiða 2 fulltrúar hjá Kappingarráðnum partvís eftir tørvi fyri Fjarskiftiseftirlitið, umleið 5% ársverk hvør.* | *Stjórin og fulltrúin arbeiða umleið 40% við øðrum enn fjarskifti, meðan bókhaldarin arbeiðir umleið 20% við øðrum enn fjarskifti.* |

**Fíggjarviðurskifti**
Fjarskiftiseftirlitið er á fíggjarlógini undir grein 6.38.3.17. Fjarskiftiseftirlitið (Rakstrarjáttan). Virksemið hjá Fjarskiftiseftirlitinum verður fíggjað á tveir hættir:

1. Regulatoriski/marknaðar-parturin verður fíggjaður við koncessiónsgjøldum, ið fjarskiftisveitararnir gjalda í mun til marknaðarpartin av føroyska fjarskiftismarknaðinum, meðan

2. Frekvensumsitingin hjá Radioeftirlitsdeildini verður fíggjað við frekvens(tíddar)- og avgreiðslugjøldum.

**Veitan av koncessión og ein komandi frælsgering av marknaðinum**

Fjarskiftislógin hevur tvinni meginhugtøk viðvíkjandi atgongd til at veita fjarskiftistænastur í Føroyum.

1. Hitt fyrra er veitan av koncessión (fjarskiftisloyvi) sambært § 8 í fjarskiftislógini.
2. Frælsgering smb. § 7 í fjarskiftislógini.

Politikkurin síðani apríl 1999, og sum aftur var staðfestur í KT-vinnupolitikkinum í 2001, hevur verið ein sonevndur open-door first come – first served politikkur (opnar dyr – fyrri var fyrri fær) gjøgnum at veita koncessión sambært § 8. Í praksis hevði tað ikki verið so stórur munur, um landsstýrismaðurin valdi at brúka heimildina í § 7, har økir vóru frælsgjørd og samstundis orðaðar reglur í kunngerð um prísáseting, samflutning v.m. Hesi viðurskifti eru í dag ásett í koncessiónini.

**Koncessiónir (fjarskiftisloyvi) veittar sambært fjarskiftislógini § 8**
Higartil eru fylgjandi koncessiónir veittar av landsstýrismanninum, sambært § 8 í fjarskiftislógini.

Koncessión á fyrsta stigi
(kringvarpsvirksemi)

1. Sp/f Rás 2 (útvarp og sjónvarp) www.ras2.fo
2. Sjálvsognarstovnurin Lindin (útvarp) www.lindin.fo
3. Suðurrás (útvarp) (óvirkin) www.sudurras.fo
4. Sp/f Kervi (sjónvarp) (óvirkin) www.kervi.com
5. Sp/f Camelot (sjónvarp) (óvirkin)
6. Sp/f Sosialurin (óvirkin) www.sosialurin.fo
7. Kringvarp Føroya www.kringvarp.fo

Koncessión á øðrum stigi (eigarafeløg o.l.)
(koncessión til at reka og veita avmarkaða fjarskiftistænastu og fjarskiftiskervi í avmarkaðum øki(kaðal- og loftborið transmissionskervi, kringvarpskervi, (hybridnet), internettænastu.

1. Eigarafelagið Millum Gilja / Oman flat
2. Eigarafelagið Inni á Gøtu
3. Eigarafelagið Norðasta Horn
4. Tykissamfelag Svínoy – Fugloy
5. Eigarafelagið Lítla Gil/Eystan Løgmannabreyt
6. Eigarafelagið Undir Brúnni
7. Rás Gjógv

Koncessión á triðja stigi
(innanlands telefonitænastur - leigulinjur innanlands, tekst- og dátasamskiftistænastur, fylgisveinatænastur og aðrar virðisskapandi tænastur, íroknað internettænastur).
(Telefonstøðir ikki íroknaðar)

| | |
|---|---|
| 1. El&Tele | www.eltele.fo |
| 2. Farodane (óvirkin) | www.farodane.fo |
| 3. formula.fo (óvirkin) | www.formula.fo |
| 4. Atlantic Online | www.atlanticonline.com |
| 5. Televarpið | www.televarp.fo |
| 6. Auxilior (óvirkin) | www.auxilior.com |
| 7. KT-felagið | www.industry.fo |
| 8. Farice Hf. | www.farice.fo |
| 9. MRCC Tórshavn | www.mrcc.fo |
| 10. P/F Elektron | www.elektron.fo |
| 11. Fa. Opus | www.opus.fo |
| 12. Fa. Nótin | www.notin.fo |
| 13. Sp/f Triang Network | |
| 14. P/F Føroya Breiðband | www.eitt.fo |

Koncessiónir á fjórða stigi
(vanliga triðjastig og íroknað telefonstøðir)

| | |
|---|---|
| 1. Teletænastan(óvirkin) | www.teleserve.fo |
| 2. Canboats (óvirkin) | www.canboats.com |
| 3. Teletech (MET) | www.teletech.fo |
| 4. iConcept | www.iconcept.fo |

Koncessiónir á fimta stigi
(Triðja, fjórða + mø. fyrsta stig, umframt fartelefonikervi og tænastur)

| | |
|---|---|
| 1. P/F Telefonverkið (FT Samskifti og FT Net) | www.tele.fo<br>www.ftnet.fo |
| 2. Kall | www.kall.fo |

**Fjarskiftisveitingar og marknaðarstøðan**
Í fylgiskjali 1 eru hagtøl fyri fjarskiftisveitingar hjáløgd.

## Breiðband- og internet

Dekningurin av landinum við ADSL breiðbandi er nú soleiðis, at nærum øll hava møguleika at keypa breiðsbandstænastur, í flestu førum kunnu tey velja millum fleiri veitarar. Síðst í decembur 2006 hevði 98 prosent av øllum føroyingum møguleika at nýta breiðband og í mars 2007 er hetta hækka til 99,6 %. Hetta ger samstundis Føroyar til eitt av fremstu londum í heiminum innan breiðbandsdekning.

Útbreiðslan í mun til fólkatalið við árslok 2006 var umleið 20,4 % roknað við 48.500 íbúgvum og 3,3 fólkum í hvørjum húski.

Havast skal í huga, at tað sambært hagtølum eru umleið 2,2 – 2,4 fólk pr. húsarhald í t.d. Danmark og Íslandi, meðan tað sambært føroysku Hagstovuni eru umleið 3,3 í Føroyum. Tískil um man samanber við Danmark og Ísland viðvíkjandi sambondum pr. íbúgva sum 1. juli 2006 vóru uml. 27-29% pr. íbúgva, so ber til at stilla føroyska talið við 1,5 ella øvugt at falda talið við tal av fólkið pr. húsarhald. Um talið við árslok 2006 verður korrigera fyri hendan munin gerst Føroyar nøkulunda ájavnt Danmark og Ísland. Her skal tó havast í huga at føroysku tølini eru 6 mánaðir nýggjari og at í ongum av londunum er tá hædd tikin fyri sambondum hjá vinnufyritøkum v.m. Samanumtikið er tí sannlíkt at nærum eins nógv fólk, ið Føroyum hava breiðband heima eins og í Danmørk og Íslandi, sum eru ímillum tey fremstu í heiminum.

Príslegan fyri breiðsbandshald er eisini fallin nógv síðan byrjan og er nu komin niður á eitt støðið, soleiðis at flest øll húsarhald skuldi kunnað verið før fyri at goldið fyri minsta haldið í øllum førum. Vøksturin á flaterate breiðsbandshaldum er eisini týðuligur og fáa brúkararnir soleiðis eisini meira fyri tað sama.

FSE metir, at gongdin er jalig, og at ikki er neyðugt við almennum stuðulsinntrivum fyri at skunda undir tilgongdina.

Talið av breiðbandskundum er nú so mikið stórt, at tað gerst sera áhugavert hjá ymiskum veitarum at menna enn fleiri innlendis tænastur, ið beinleiðis kunnu gagna brúkarunum í teirra dagligdegi.

Annað jaligt er, at aðrar tøknir sum kunnu fara at økja um kappingina eru á veg fram. T.d. hevur FT Net ítøkuligar ætlanir um at leggja nýtt fiburkervi til endabrúkaran, umframt nýggj tráðleys breiðbandstøkni er á veg fram, t.d. WIMAX[1]

Tað ræður um at lata marknaðin og tænasturnar mennast. Fleiri kappingarneytar eru á marknaðinum, og vil hetta við tíðini menna veitingarnar og viðføra lægri prísir og/ella viðføra, at kundin fær meira fyri pengarnar.

---

[1] Worldwide Interoperability for Microwave Access. Standardtøkni, ið gevur høga ferð yvir lutfalsliga langar strekningar. Kann nýtast til at kappast um “the last mile” móti koparkervinum.

**Fastnetstænastur**
Innan fastnetstænastur er greið minking í ferðsluni. Lutvíst er talan um at brúki av uppringdum interneti er nógv fallandi, tí fólk skifta til breiðband, umframt at fólk ið hava atgongd til breiðbandi nú stendur í boði at brúka IP-telefoni til at ringja við, tað veri seg frá føroysku veitarunum av IP-telefoni (iConcept og Teletech) sum komu á marknaðin í desember 2005 ella útlendskum veitarum so sum Skype. At ringja við IP-telefoni er bílígari enn vanligt fastnet, t.d. er tað bíligari at ringja til Danmarkar enn at ringja við vanligum PSTN til grannan. IP-telefoni frá føroyskum veitarum hevur tó ikki rættuliga tikið dik á seg enn, men í 2007 kann tó væntast at IP-telefoni útbreiðslan fer at økjast, m.a. tí fleiri og fleiri húsarhald útvega sær breiðband, umframt at aðrir veitarar vantandi fara at bjóða IP-telefoni tænastur.

Við árslok 2006 vóru 450 IP-telefoni hald frá føroyskum veitarum, mótvegis 309 við endan av 1. hálvári 2006. Hagtøl fyri hvussu nógv útlendsk IP-telefoni hald, sum t.d. Skype, eru ikki tøk í Føroyum; tískil er ávís óvissa um veruliga útbreiðsluna av IP-telefoni í Føroyum. Viðmerkjast kann at Skype ikki hevur gateway/PSTN til føroyska fastneti og tískil eru innalanda samrøður umvegis Skype lutfaldsliga dýrar. Ongar reglur eru, sum forða útlendskum veitarum at seta gateway upp í Føroyum, so orsøkin er helst at teir meta føroyska marknaðin verða ov lítlan.

Sum heild er góðskan á IP-telefoni samskifti ikki á sama støði sum samskifti umvegis vanligt fastnet, men alsamt vaksandi bandbreiddin bæði innan- og uttanlanda bøtir støðugt uppá hetta. Hinvegin er IP-telefoni samskifti væl kappingarført, tá tað ræður um prísir fyri uttanlanda samrøður.

Tøkniliga trygdin á IP-telefoni er eisini framvegis munandi verri enn á fasta netinum og er hetta helst ein av orsøkunum til at fastneti framvegis hevur meginpartin av innalanda ferðsluni.

Ein onnur orsøk til at ferðslan innan fastnet minkar er at prísirnir innan fartelefoni eru minkaðir.

**Fartelefoni**
Kapping innan fartelefoni hevur virkað nú í nøkur ár. Á at kalla øllum búplássum í Føroyum ber til at tosa í fartelefon.

Á fartelefoni økinum er tveir veitarar á marknaðinum, sum báðir veita GSM-900 tænstur. FT Net hevur landsdekkandi kervi og Kall hevur egið GSM-kervi, sum røkkur stóran part av landinum. Kall hevur eina innalanda reikingaravtalu við FT Net fyri tey økir í landinum, sum Kall sjálvt ikki dekkar.

Vøksturin innan fartelefoni er stórur og metir FSE at fartelefonin kemur at yvirtaka ein munandi part av samskiftinum, sum nú er á fastnetinum.

15. juli 2006 bleiv NMT-450 skipanin niðurløgd. Í hesum sambandi fingu NMT-kundar í boðið at skifta yvir til GSM-skipanina. Í samband við niðurlegging av NMT-skipanin

íkomu ávísir  trupulleikar viðvíkjandi dekningsøkinum tætt við land og í millum oyggjarnar. Arbeitt verður við hesum, m.a. at tillaga verandi dekningsøki og partvís at seta nýggjar støðirupp. Í staðin fyri NMT-450 er annars fylgisveinasamskifti til taks.

GPRS dataflutningur hevur nú verið tøkur til fartelefonbrúkarar eini tvey ár, men tykist higartil ikki at hava haft nakran stóran týdning fyri fjøldina. Sum sæst í hagtølum hjáløgd í fylgiskjali 1, so er ein lítil minking í nýtsluni av GPRS dataflutningi frá 1. hálvár til 2. hálvár 2006.

Innan MMS-boð er støðan tann sama sum innan GPRS-dataflutning.  Frá 1. hálvár til 2. hálvár sæst eisini her ein lítil minking av sendum MMS-boðum. Høvuðsørsøkin til at MMS-boð ikki sláa ígjøgnum hjá brúkaranum er at tað ikki ber til at senda MMS-boð ímillum FT Samskifti og Kall.  Arbeitt hevur verið við at gera eina sambindingaravtalu millum partarnar sum enn ikki er komin í lag. Avtala verður helst gjørd í 2007.

Yvirtakserað sms-boð fáa alsamt fáa alsamt størri týdning í grannalondunum. Hetta tykist eisini verða eitt rák, ið fer at gera seg galdandi í Føroyum og ber til at ímynda sær at yvirtakseraði sms-boð kunnu nýtast til alskyns tænastur, tí skipanin er vælegnað til avrokning av smærri upphæddum.

**Fylgisveinatænastur**
Teletænastan (TeleServe) er meginveitari, umframt FT Samskifti, El&Tele og Vikmar. Fleiri nýggjar tænastur verða støðugt mentar til stórt gagn fyri brúkarnar, serliga á havinum.

**Kringvarpsvirksemi v.m.**
Áhugin fyri kringvarpi  í Føroyum hevur verið lutfalsliga stórur síðani einkarrætturin varð avtikin í 1999.

*Útvarp*
Innan útvarp eru 3 at kalla landsdekkandi rásir - Útvarp Føroya, Rás 2 og Lindin. Allar senda við analogari tøkni og í stóran mun ber til at móttaka í stereogóðsku. Hartil sendir ÚF á millumbylgju, ið dekkar kring Føroyar og í norðurhøvum.

Eitt annað felag hevur fingið konsessión á fyrsta stigi, og fyrireikandi arbeiðið fer fram í løtuni.

*Sjónvarp og fylgisveinasjónvarp*
Umframt SVF, ið er landsdekkandi, eru fleiri sjónvarpskaðalnet knýtt at limum í eigarafeløgum. Koncessiónirnar til eigarafeløgini eru avmarkaðar til kaðalnet til sjónvarp og intra- og internet í avmarkaðum landafrøðiligum øki t.e. einum býlingi o.l.

Televarpið við sínum digitalu jørðsendinets-tænastum (DVB-T ella DTT tænastur) hevur havt eina støðuga útbygging. Í 2006 komu fleiri sendidistinatiónir, sum hava

bøtt munandi um sjónvarpskvalitetin á teimum minnu plássunum í "norðøkinum". Fyrireikingar eru gjørdar, via Sandoynna, til at uppbyggja Televarpið í Suðuroynni.

**ÚF/SVF sendinetini (Kringvarp Føroya)**
Sendinetini hjá ÚF/SVF hava í fleiri ár verið rikin av Føroya Tele, ið fekk eina árliga upphædd fyri uppgávuna til rakstur og viðlíkahald.

FSE hevur í frágreiðing, sum eina arbeiðsbeiðsbólkur í 2005 lat landsstýrismanninum, gjørt vart við týdningin av at bjóða rakstur av sendinetum út, umframt at víst var á ymisk kappingaratlit í sambandi við komandi sendinet.

Málsøkið var 1. januar 2006 flutt til Mentamálaráðið og sum skilst er ætlanin at fara undir at bjóða tænastur út.

Á heysti 2005 samtykti løgtingið at skifta MB-sendaran í Akrabyrgi út. Sjálvt útskiftingin er enn ikki farin fram, men sum skilst verður hetta í næstum.

Loyvir eru givin til fleiri FM-sendarar, sum skulu bøta munandi um móttøkugóðskuna í Sundalags-, Hvannasunds- og Tvøroyrarumráðnum. Mentamálaráðið hevur søkt um loyvi til FM-sendara á Sornfelli, men hevur eftirlitið enn ikki tillutað hetta loyvi, hetta orsakað av at loftferðslumyndugleikarnir meta, at FM-sendarar á Sornfelli kunnu ávirka ILS-skipanin (Instument Landing System) á flogvøllinum í Vágum, tí innflúgvingarleiðin hjá flogførunum yvir Miðvág liggur tætt framvið Sornfelli. FSE arbeiðir víðari við at finna eina loysn á hesum trupulleika.

**Sambinding og samskipan av fjarskiftiskervum og fjarskiftistænastum**
Føroyska lógin er ein sokallað rammulóg, tvs. at hon ikki neyvt ásetur hvørjar tøkniligar sambindingar og samskipanir kunnu fara fram, men heldur lýsir nøkur fyribrigdi, ið síðani skulu metast um, út frá um tað tøkniliga, umsitingarliga og fíggjarliga v.m. letur seg gera.

Avtalur um atgeingi og samráðingar um atgeingi til kervi í Føroyum

*Føroya Tele Samtakið (FT Net og FT Samskifti) veitir fylgjandi sambindingar- og samskipanartænastur:*
1. Sambinding av internetryggum / atgeingi til altjóða internetið.
2. Koblaður samflutningur á fastnetinum PSTN/ISDN.
3. Fast forskoyti og forskoyti til PSTN/ISDN.
4. Innanlands leigulinjur.
5. Uttanlands leigulinjur á FARICE-1 og CANTAT-3, við backhaul.
6. Innanlands reiking innan fartelefoni GSM-900.
7. Samhýsing – mastrar/ hús kring um í Føroyum.
8. Tænastuavtalu (hald v.m.) á fastnetinum PSTN.
9. Svart fipur atgeingi.
10. Rátt kopar – shared Access.
11. CNA-tænasta (Changed number announcement).

12. Bitstream Access xDSL v/IP-konnektiviteti.
13. MPEG transmissión til einvegis dataflutning (í samband við kringvarp).

*Kall veitir fylgjandi sambindingar- og samskipanartænastur:*
1. Sambinding av internetryggum / atgeingi til altjóða internetið.
2. Innanlands leigulinjur.
3. Uttanlands leigulinjur á FARICE-1 og CANTAT-3, við backhaul.
4. Samhýsing – mastrar/ hús kring um í Føroyum.
5. CNA-tænasta

*Teletech veitir fylgjandi sambindingar- og samskipanartænastur:*
1. Samhýsing – mastrar/ hús kring um í Føroyum.

*KT-felagið veitir fylgjandi sambindingar- og samskipanartænastu:*
KT-felagið hevur meira ella minni óformilga rikið sonevnda THOR-IX í Tórshavn, ið er ætlaður at tryggja, at innanlands internetferðsla verður umskift í landinum og ikki tyngir uttanlanda kapasitetin. Tríggir veitarar eru í løtuni knýttir at THOR-IX, og er ferðslan í støðugum vøkstri. Feløgini umskifta innanlands internetferðslu ókeypis. Í 2006 hevur verið arbeitt við at umleggja Thor-IX, og uppskotið er at gera virtuellan THOX-IX sum FT Net skal húsa.  Arbeiðið hesum viðvíkjandi er tó enn ikki komið á mál.

**Uttanlandasamskiftistøknir**
Møguleikarnir fyri uttanlandasamskifti eru fylgjandi:

1. Sjókaðalin CANTAT-III
2. Sjókaðalin FARICE-I
3. Fylgisveinar

Farice-I varð tikin í nýtslu í 2004, so er framhaldandi útbygging av samskiftismøguleikunum við útheimin enn sera týðandi. Eitt trístreingjað samband við útheimin vil økja munandi um tryggleikan, umframt at óvissan kring CANTAT-III er so mikið stór, at tað er neyðugt í góðari tíð at hava ein eyka kaðal umframt FARICE-I. CANTAT-III kaðalin  millum Ísland, Føroyar og Skotland sær út til at hava tænt fyri seg, sjálvt um hann framvegis verður nýttur sum alternativ til FARICE-kaðalin.

Føroya Tele Samtøkan hevur boðað frá,  at felagið hevur tiktið avgerð um at gera íløgu í ein nýggjan sjókaðal, kallaður SHEFA-2 millum Føroyar, Shetland, Orknoyggjar og Skotland. Kaðalin verður væntandi klárur at leggja á sumri 2007 og skal eftir ætlan takast í nýtslu síðst í 2007.  FSE metir ætlanina vera sera áhugaverda og vera við til at økja um tryggleikan fyri framtíðar gott og bíligt samskifti. Samstundis hevur FSE gjørt vart við hjá samtakinum, at FSE metir tað vera hóskandi, at nýggi kaðalin verður lagdur í eitt dótturfelag ella líknandi, fyri harvið at tryggja eyka gjøgnumskygni. Ein orsøk til at til ber at fara undir hesa verkætlan er at við nýggjastu fipurtøknini ber til at hava ein kaðal til Hetlands uttan at neyðugt er at hava forsterkarar og ger hetta skipanina munandi bíligari bæði í íløgu og rakstri.

Hetta er so eisini við til at betra um útlitini fyri framtíðar kaðalum á handilsligum grundarlagi.

**Prísásetingarmeginreglur**
Ein týðandi partur av fjarskiftisskipanini er prísásetan og marknaðarframferð. Sambært prísásetingarmeginreglunum í fylgiskjali 1 til koncessión til veitararnar skal Fjarskiftiseftirlitið góðkenna avsláttarskipanir. Fjarskiftiseftirlitið hevur haft fleiri mál viðvíkjandi prísáseting, avsláttri, prísdifferentiering og marknaðarsegmentering. Tað er av stórum týdningi fyri gjøgnumskygni á marknaðinum, at tær lutfalsliga einføldu reglurnar verða hildnar, fyri at tryggja, at standardveitingar verða veittar til somu treytir og prísir.

**Veitingarskyldan hjá Føroya Tele og randøkir**
Sambært fylgiskjali 3 í koncessión til Føroya Tele frá 15. apríl 1999 hevur Føroya Tele veitingarskyldu á vanligari telefoni PSTN og ISDN sbrt. nærri treytum. Tað er vanligt, at størsti veitarin á einum marknaði verður álagdur eina veitingarskyldu.

Samanumtikið hava randøkir sum heild eitt nøktandi samskifti viðvíkjandi fastneti, uppringdum interneti, fartelefoni, umframt at breiðbandið nú eisini røkkur til nærum allar íbúgvar í Føroyum. Tað eru heilt fá búpláss eftir, ið ikki hava møguleika at samskifta umvegis breiðbandið; í samband við byrjan at veita breiðbands tænastur er tað fyri veitaran er spuringur til stovnsetingarkostnað í mun til íbúgvaratal og inntøkumetingar.

Í samband við ætlanir um at leggja fibur til heimið hevur Fjarskiftiseftirlitið í 2006 í samstarv við FT Net sett hol á arbeiðið um at allýsa innihaldið í veitingarskylduni av nýggjum. Vantandi verður nýggj allýsing av veitingarskylduni klár í 2007.

**Nummarviðurskifti**
Í Føroyum hava vit ikki sonevndan nummarportabilitet, ið kundi verið aktuellur fyri kundar, ið skifta millum veitararnar á fartelefonøkinum og frá fastnet til IP-telefoni. FSE hevur í 2006 eins og undanfarin ár kannað henda spurningin nakað. Framvegis er lítil áhugi hjá veitarunum fyri hesi skipan, seliga grundað á, at mett verður at kostnaðurin er ov høgur í mun til brúkaraskarðan og mun til gagnvirki.

Ein fyribils loysn, ið verður brúkt, er ein sonevnd CNA-tænasta (Changed number announcement), har ein boðklivi boðar frá, hvat nýggja nr. hjá felaganum er. Fjarskiftisveitarar hava gjørt samstarvsavtalur um hetta.

**Tilbúgvingarviðurskifti**
Sambært § 8 í koncessión til Føroya Tele tekur felagið lut í almennu tilbúgvingarskipanini. Hetta er staðfest í endurskoðaða ískoytinum til koncessión hjá Føroya Tele frá desember 2006. Harumframt hevur Kall eisini fingið álagt nakrar uppgávur í hesum sambandi. Høvuðsbyrðan liggur á Føroya Tele, av tí at felagið er

meginveitari í Føroyum og hevur grundleggjandi infraskipanina um hendi.

Harumframt skulu hinir føroysku fjarskiftisveitararnir eftir áheitan frá landsstýrismanninum taka lut í almennu tilbúgvingarskipanini.

Sambært fylgiskjalinum er endamálið at tryggja tilrættalegging og gjøgnumføring av tilbúgving innan fjarskifti viðvíkjandi alarmsentralinum, harímillum er Føroya Terle álagt ókeypis at røkja og stovna serliga leigulinjuskipan. Arbeiðið við at seta upp leigulinjur hevur drigið út. Arbeiðið var tó komið væl áleiðis í 2006, tá kom fram at onkur misskiljing hevur verið ímillum partarnar og Politiið førdi fram, at leigulinjurnar í síni heild ikki kunnu íbindast 112-vekslaran, sum fylgiskjali ásetur, men at nakrar linjur mugu íbindast vanliga vekslaran hjá Politinum 351448. Av hesi orsøk kom steðgur í arbeiði, men Føroya Tele og Politiið er nú ferð við at kannað hvussu íbindingin til leigulinjuskipanin nú skal skipast.

Harumframt er ætlanin at áseta reglur í fylgiskjali um fjølmiðlatilbúgving til Rás 2 og Lindina, umframt avtalu við Kringvarp Føroya (ÚF og SVF) um fjølmiðlatilbúgving eru lidnar. Ætlanin var at senda landsstýrismanninum tilmæli hesum viðvíkjandi, men grundað at seinkingar í stovnsetingini av leigulinjuskipanini er hetta eisini seinkað.

Eftir eru so generell tilbúgvingarkrøv, neyðstreymur, vernd av útgerð, bygningum og starvsfólkatilbúgving. FSE hevur kannað hesi viðurskifti í eina tíð, men hevur enn ikki røkki nakra niðurstøðu.

**Altjóða og millumtjóða viðurskifti**

Í altjóða fjarskiftishøpi eru Føroyar í ITU (International Telecommunication Union) skrásettar sum territorial administration (økisumsiting) og samskiftir Føroyar beinleiðis við ITU í ymiskum viðurskiftum.

Fjarskiftiseftirlitið hevur eisini møguleika fyri at luttaka saman við danska IT- og Telestyrelsen og Videnskabsministeriet á fundum v.m. innan ITU og í øðrum fjarskiftisfelagsskapum.

Annars hevur FSE gott samband við fyrisitingarmyndugleikar innan fjarskifti, serliga í Norðurlondum.

FSE luttøk í desember 2006 á ITU TELECOM WORLD ráðstevnu, sum verður hildin 4. hvørt ár.

Síðani á várið 2006 hevur FSE umboðað Føroyar í GAC (Governmental Advisory Committee) innan ICANN, ið er felagsskapurin, ið umsitur eyðmerkingarskipan og protokollir á internetinum. FSE er í ferð við at skriva ein samandrátt av royndunum higartil og gera nøkur tilmæli og uppskot um leiklutin hjá Føroyum í ICANN og samskipan á økinum við FO-ráðið, ið umsitur .fo navnaøkið.

**Radioeftirlitsvirksemi – tilluting av frekvensum (tíddum), radioprógvum v.m.**

Radioeftirlitsdeildin hevur um hendi umsiting av frekvens(tíddar)- og radioloyvum til:

Bátar / Skip / Flogfør
Radiostøðir á landi
Áhugavarparar

Radioeftirlitsdeildin hevur eftirlit við hesum radiostøðum eins og avlurting (monitering) av tíddum, peiling av radioórógvi o.ø.

Deildin umsitur, próvdømur og útskrivar siglinga radiopróvbrøv til navigatørar.

Gongdin vísir alsamt størri og vaksandi eftirspurning eftir tíddum í sambandi við frælsgeringina av fjarskiftinum í Føroyum, umframt ein vaksandi eftirspurning eftir siglinga radiopróvbrøvum.

Siglinga radiopróvbrøvini fevna um:

| | |
|---|---|
| GOC | General Operator's Certificate |
| LRC | Long Range Certificate |
| ROC | Restricted Operator's Certificate |
| SRC | Short Range Certificate |

Loyvishavararnir gjalda árligt loyvisgjald, umframt at nøkur próvbrøv skulu endurnýggjast við jøvnum millumbili.

*Loyvi á radioøkinum*

| | Samlað tal pr. 31.12.2006 | Tilgongd/frágongd í mun til 31.12.2005 |
|---|---|---|
| Bátar og skip | 2.152 | + 27 |
| Landstøðir | 1.200 | - 21 |
| MMSI | 519 | + 94 |
| Áhugavarparar | 57 | - 2 |
| Kallitekin | 1.453 | + 161 |
| Radiopróvbrøv | 6.159 | + 1.000 |

Umframt tilgongd og frágongd av loyvum á radioøkinum, er eisini talan um vaksandi kundarøkt á øllum økjum.

Ein vøkstur hevur verið fyri bátar og skip, MMSI, Kallitekin og Radiopróvbrøv.

Afturgongd hevur verið fyri Landstøðir og Áhugavarparar.

Fyri Bátar og Skip kann væntast, at stígur er komin í tilgongdina, og at talið fram yvir kemur at liggja um 2.100, sum tó má sigast at vera sera høgt í mun til fólkatalið, tá vit samanbera okkum við grannalondini.

Fyri Landstøðir heldur afturgongdin fram.  Sum áður sagt kemst hetta mest av at nakrir brúkarar av landmobilum radioútbúnaði eru farnir frá at brúka siðvandan, landmobilan radioútbúnað, yvir til at brúka eitt nú fartelefonir í staðin.

Nýggj kunngerð var sett í gildi í heyst, sum lættir nýtsluna av láorkusendarum serstakliga til fjarstýringsendamál.

Í somu kunngerð vóru loyvisársgjøld fyri áhugavarparar avtikin. Hesin áhugabólkur er í støðugari afturgongd tí aðrir globalir samskiftismøguleikar, eitt nú alnót og teldupost, hava skapt størri áhuga hjá tí unga ættarlignum

Tað hevur verði ein stórur áhugi á FWA umráðnum. Hetta hevur ført til at 3,6 – 3,7 GHz bleiv opnað til WiMax tænastur. Tænasturnar eru higartil serliga útbjóðaðar í Høvuðsstaðarøkinum og á Skálafjarðarøkinum.

Arbeitt verður við at dagføra frekvensætlanina fyri Føroyar. Sjálv dagføringin er liðug, men nýtsluvegleiðingarnar eru ikki heilt lidnar.  Frekvendsætlanin verður vantandi klár at seta í gild um ein 1 mánað. Tá verður føroyska frekvensætlanin á jøvnum føti við frekvensætlnair í grannalondunum og í nøkrum førum betri.

**Einskiljingartilgondin**
Síðani 1999 hevur verið arbeitt við at skapa fortreytir fyri frælsari kapping á fjarskiftisøkinum. Talan hevur verið, eins og í øðrum londum har hetta er gjørt, um eina drúgva tilgongd. Samanumtikið kann sigast at tað lutvíst hevur eydnast at fingið nakað av kapping innan ymisku tænastuøkini. Fyrst innan fylgisveinatænastur, síðani fastnetstænastur, fartelefoni, uppringt internet, breiðband, sjónvarpsveitingar, kringvarp, umframt ymiskar atknýttar tænastuveitingar v.m. Innan hesi øki eru í øllum førum í minsta lagi tveir veitarar av tænastum. Hvussu verða komandi árini, hvat kapping viðvíkur, er torført at meta um. Í summum førum er tað tengt at støddini á føroyska marknaðinum, og ger at fyritøkur møguliga skulu hava ávísa stødd fyri at kunna reka nevndu tænastur á ein vinnubúskaparligan skynsaman hátt. Tó ber til at staðfesta, at sjálvt innan íløgutung øki sum fartelefoni hava íleggjarar mett tað áhugavert at gera íløgur í Føroyum.

Hesi árini hevur fyrrverandi einkarfelagið P/F Telefonverkið (Føroya Tele), sum hevur runda tey 100 árini, havt almennan eigaraskap. Í fleiri ár hava ymisk politisk ynski verið frammi um at einskilja felagið og harvið taka enn eitt stig móti marknaðartillaging av fjarskiftismarknaðinum.

Í samband við einskiljing av FT hevur Fjarskiftiseftirlitið víst á tvær loysnir. Ein loysn

*A. Fremja eina einskiljing av FT Samtøkuni* og eina loysn *B. Fremja eina fulla ognarskiljing av FT Net úr Føroya Tele Samtøkuni.* [2]

Torført er at taka endaliga dagar í millum loysn A og B. Ein av grundfatanunum, ið liggur handan loysn B, er at netfelagið hevur eitt infrakervi um hendi, t.e. kopar- og fipurkervi, og tað er sera kostnaðarmikið at eftirgera. Tó so, ymisk tráðleys kervi eru eisini, t.d. FWA og tað vinna alsamt ymiskar nýggjar tøknir fram.

Av týdningi er m.a., hvussu framtíðar marknaðarstøðan hættar seg á fjarskiftisøkinum, hvat íløgutørvi og tøknifrøði viðvíkur. Møguleiki er fyri, at kostnaðarstøðið av at seta í verk nýggjar tøknir, eins og kostnaðurin fyri at stovnseta seg á føroyska fjarskiftismarknaðinum sum frálíður verður minni ella heldur sær á sama støði sum nú. Um so verður er loysn B at fyritrekkja, tí hendan skapar betri fortreytir fyri fleiri aktørum á marknaðinum og tískil betri fortreytir fyri virknari kapping á kervisøkinum.

Við framtíðini í huga, metir FSE at samanumtikið má roknast við, at tær einstøku skipanirnar verða minni, hvat íløgu, íverksetan og rakstri viðvíkur.

Um loysn A verður vald metir FSE at tað er umráðandi, at ymiskar eftirlitsheimildir verða lagdar til myndugleikan. Eitt nú kundi verið talan um at áseta reglur um samleggingareftirlit, soleiðis at myndugleikin kann seta bæði bygnaðarligar og atferðartreytir til eina møguliga samanlegging av FT Net og FT Samskifti um FT Samtøkan verður selt undir einum. FSE metir sum útgangsstøði, at frægast er, at ásetingar um samanleggingareftirlit verða lagdar í kappingarlógina, heldur enn fjarskiftislógina, fyrst og fremst tí at samanleggingareftirlit óivað er eitt viðkomandi amboð í nógvum vinnugreinum, havandi í huga mongu tyrpingarnar innan ymisku vinnugreinarnar.

FSE metir eisini at tað er hóskandi at heimildir verða tillagdar til myndugleikan, soleiðis at myndugleikin kann krevja nærri greinað virksemi í dótturfeløg.

Havast má í huga, at er loysn A fyrst vald, ber sera illa til eftirfylgjandi at velja loysn B, men um loysn B verður vald, ber til at fara aftur til eina støðu sum loysn A.

Samumtikið ræður um at finna eina loysn sum ikki læsur støðuna fasta framyvir, men gevur møguleika fyri tillaginum, soleiðis at føroyski fjarskiftismarknaðurin til eina og hvørja tíð hevur kappingarførar og dagførdar kervistænastur, sum allir veitarir hava javnbjóðis atgongd til og harvið hava møguleika at veita endabrúkarinum eitt breitt og fjølbroytt útboð av fjarskiftistænastum til kappingarførar prísir.

[2] Upprit frá FSE, dagfest 17. mars 2006: *"Eftirmeting av bygnaðinum hjá P/F Telefonverkinum (Føroya Tele Samtakinum) ið var settur í verk í juli 2005".*